**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Merking av toski. Túrur nr. 2042**
**Tíðarskeið: 07/10-14/10 – 2020**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Poul Vestergaard, Sigvald Kristiansen, Mourits Mohr Joensen (toktleiðari)

**Ábyrgd: Petur Steingrund.**

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og øðrum fiskasløgum á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:**
15 smáfiskar á ca. 50 (40-60) cm frá Mýlingsgrunninum vóru frystir heilt óviðgjørdir til Umhvørvisstovuna.

**Reiðskapur og onnur útgerð:**
Stjørnutrol við 100 mm meskum í posanum.
Vágshurðar, ROCK trawl-doors.
Breitlalongin er 60 m.
Rockhopper grunnur.

Ein pistólur verður nýttur til at festa floymerkini við.
1000 l kør og slangur.
Mátibretti.
Vekt.
Klokka.
Skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:**
Vit loystu av Havnini kl. 20:00 mikukvøldið hin 07. oktober. Haðani gekk leiðin eysturyvir í Svínoyarhavið, har vit høvdu 9 hál. Haðani gekk leiðin á Mýlingsgrunnin, har vit høvdu 15 hál.
Tað bleiv eitt sindur tvassut, so vit stimaðu vestur á Bøin, har vit høvdu 12 hál.
Síðan fóru vit vestur úr Sandoynni og Skúvoynni, tóvaðu okkum suður vestur úr Suðuroynni, har vit høvdu 20 hál í alt. Vit endaðu túrin norður úr Bakkanum, har vit høvdu 3 hál.

Vit høvdu í alt 59 hál, umleið ein tíma hvørja ferð.

Vit landaðu til Barið kl 07:00 mikumorgunin hin 14.10.20. Veðrið var sum heild gott allan túrin.

**Fyribils úrslit.**
Fiskaríið varð sum heild smáligt, og toskurin var smáfallandi á øllum leiðunum vit royndu. Tó var hann rímuliga væl fyri. Konditiónsfaktorurin lá á 1 á øllum leiðunum vit royndu.
Miðallongdin á toskinum er 54,5 cm.

Vit merktu tilsamans 1706 toskar. Eisini merktu vit 20 hýsur. Í alt merktu vit 1774 fiskar.

Vit fingu 4 merktar toskar aftur.

| **Leiðir, ið merkt varð á** | **stk. Toskar** |
|---|---|
| Eystanfyri | 253 |
| Mýlingsgrunnur | 246 |
| á Bønum | 184 |
| Vestanfyri Suðuroynna/vestanfyri Bakkan | 532 |
| Norður úr Bakkanum | 491 |
| **Merktir toskar í alt:** | **1706** |

| **Slag** | **Toskar** | **Hýsa** | **Reyðspr.** | **Havtaska** | **Tunga** | **Upsi** | **Steinbítur** | **Í alt** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stk merktir fiskar** | **1706** | **20** | **14** | **19** | **8** | **5** | **2** | **1774** |

Umborð á Magnus Heinason 13-10-2020

Mourits Mohr Joensen